# Svimjigentan avdúkað

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi og norði og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

**Í gjár klokkan 16 varð standmyndin „Svimjigentan" avdúkað uttanfyri svimjihøllina í Havn. Hetta er ein liður í ætlanini hjá býráðnum um at fríðka um býin við listaverkum**



SVIMJING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Havnar Hornorkestur hugnaði um løtuna við góðum tónleiki. Jógvan Arge helt røðu, har hann hugleiddi um bragdið hjá Sigmundi Brestison, tá ið hann svam úr Suðuroy til Sandvík. – Standmyndin skal vera ein heiður til tey svimjibragd, sum hava verið framd ígjøgnum tíðina. Tað er ikki tilvildarligt, at tað er ein genta. Tað hava verið kvinnurnar, sum hava gingið á odda innan svimjing í Føroyum við fleiri heiðursmerkjum í altjóða kappingum, segði Jógvan Arge.

Eftir røðuna hjá Jógvani Arge avdúkaði Heðin Mortensen, borgarstjóri, standmyndina. Tað er Hans Pauli Olsen, sum hevur gjørt standmyndina. Grótið er innflutt úr Svøríki. – Eg ætlaði ikki, at standmyndin skuldi verða so stór, men býráðið ynskti at hava eina stóra standmynd. Eisini ætlaði eg at hava hana nærri hurðina, men hetta her riggar bara heilt væl, sigur Hans Pauli Olsen.

Heðin Mortensen er sera væl nøgdur við standmyndina. Hetta er ein liður í ætlanini hjá býráðnum at fríðka um býin við listaverkum. – Vit hava nýtt Hans Paula fyrr, og hann er heilt vist okkara besti listamaður innan økið, sigur Heðin Mortensen.

Undirparturin á gentuni er minni enn høvdið. – Hetta skal ímynda ta visuellu forskjótingina, sum hendir, tá ið tú kemur niður í vatnið, sigur Hans Pauli Olsen.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 15 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 21 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 21 |
| Athen | -- |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 15 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 26 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. við Skotland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður skamt í landsynning úr Føroyum.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Hetland stendur mestsum í stað og vestan fyri lágtrýstið verður stundum nógvur vindur av landnyrðingi yvir Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/5 kl. 06⁰⁰– 18/5. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 17/5 kl. 06⁰⁰– 18/5 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 17,9 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 7. mai | Mánin longst frá jørðini |
| 13. mai | Fullmáni |
| 20. mai | Seinna kvarter |
| 22. mai | Tendring |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. mai | 11.35 | - | 10.35 | 23.00 | 10.50 | 23.15 | 01.07 | 13.35 | 02.07 | 14.35 | 09.50 | 22.15 | 08.50 | 21.15 | 11.50 | - | 00.22 | 12.50 | 11.20 | 23.45 | 00.07 | 12.35 |
| 19. mai | 00.00 | 12.26 | 11.26 | - | 11.41 | - | 02.00 | 14.26 | 03.00 | 15.26 | 10.41 | 23.18 | 09.41 | 22.18 | 00.15 | 12.41 | 01.15 | 13.41 | - | 12.11 | 01.00 | 13.26 |
| 20. mai | 01.03 | 13.41 | 00.03 | 12.41 | 00.18 | 12.56 | 03.03 | 15.41 | 04.03 | 16.41 | 11.56 | - | 10.56 | 23.32 | 01.18 | 13.56 | 02.18 | 14.56 | 00.48 | 13.26 | 02.03 | 14.41 |
| 21. mai | 02.17 | 14.54 | 01.17 | 13.54 | 01.32 | 14.09 | 04.17 | 16.54 | 05.17 | 17.54 | 00.32 | 13.09 | - | 12.09 | 02.32 | 15.09 | 03.32 | 16.09 | 02.02 | 14.39 | 03.17 | 15.54 |

5 707265 100050 >